# ítróttur

Nr. 243 • fríggjadagur • 18. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
**Sunset kappingin**

| dagur | kl | dystur | dómarar |
|---|---|---|---|
| 18.12 | 14.30 | Kyndil-Stjørnan | Hartvig Joensen & Pole Hansen |
| 18.12 | 15.00 | StÍF-VÍF | Heri Petersen & Brandur Johansen |
| 18.12 | 15.00 | VB-Tjaldur | Kristian Johansen & Sámal Hansen |
| 18.12 | 16.30 | Søljan-Neistin | Kári Hansen & Dánjal Hansen |

**Flogbóltur**
**Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 18.12 | 13.00 | Dráttur-TB | SÍ |
| 18.12 | 14.00 | KÍF-Mjølnir | ÍF |
| 19.12 | 14.00 | ÍF-SÍ | Mjølnir |

# Líkist bronsuuppgerð

**Tað er støðan, tá Neistin leygardagin vitjar á Giljanesi. Í hinum trimum dystunum tykist favorittleikluturin at vera hampuliga greiður**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Seinasta umfarið hesumegin jól er á skránni í Sunsetkappingini í hondbólti. Mest spennandi uppgerðin tykist vera á Giljanesi, har Neistin kemur á vitjan hjá Søljuni. Størsta partin av árinum hevur støðan verið tann, at hesi bæði liðini hava stríðst um triðja plássið. Ein dystur, sum Neistin í fyrsta umfari vann, tá tær vunnu heimadystin á Søljuni, men nú er so útidysturin á skránni.

Í hinum trimum dystunum tykjast favorittleikluturnir at vera nakað greiðari. Tað man neyvan vera nakar ivi um, at VB og Stjørnan eru risa-favorittar, tá tey skulu royna seg móti botnliðunum báðum, Tjaldri og Kyndli.

Seinasti dysturin er á Skála, har VÍF kemur á vitjan hjá StÍF. Higartil í ár hevur VÍF greitt verið við yvirlutan teirra millum, men skal StÍF sleppa sær nakran veg uppeftir, so er tað helst fyrst og fremst móti vestmenningum, at tær hava møguleikan til tess.



*Tað eydnaðist Neistanum at vinna dystin í Havn móti Søljuni. Nú skulu tær royna seg á útivølli í tí, sum líkist eini uppgerð um bronsuna*

# Andrew longt við Fremad Amager

**Føroyski landsliðsframherjin Andrew av Fløtum undirskrivaði í gjáramorgunin undir ein nýggjan sáttmála við Fremad Amager**

ÚTISETAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tíðliga fríggjamorgunin skrivaði føroyski landsliðsframherjin Andrew av Fløtum undir ein nýggjan eittára sáttmála við Fremad Amager. Gamli sáttmálin hjá Andrew gekk út 1. desembur, og nýggi sáttmálin er tí galdandi frá tí degi og eitt ár fram.

**Venjarin vildi hava Andrew at halda fram**

Tað er Jákup í Stórustovu, umboðsmaður hjá Andrew av Fløtum, sum vegna føroyska leikaran hevur samráðst við Fremad Amager um nýggja sáttmálan hjá Andrew. Hann sigur, at tað var eitt ynski hjá venjaranum hjá Fremad Amager, Benny Johansen, at Andrew skuldi halda fram í felagnum. Harvið er Andrew tann einasti av teimum trimum føroyingunum sum fyri góðum ári síðani fóru til Fremad Amager at royna seg um yrkisleikara, ið heldur fram í felagnum komandi ár, eftir at bæði Jann Ingi Petersen og Hjalgrím Elttør hava valt at koma aftur til Føroya.

Við nýggja sáttmálanum hjá Andrew sær tað nú eisini út til, at talan vónandi verður um eina føroyska uppgerð í fjórðingsfinaluni í donsku steypakappingini, tá ið Fremad Amager skal dystast við Toda Jónsson og FC Keypmannahavn í Parkini komandi vár.

# TB á lúmskari uppgávu

**Dráttur var nær við at taka stigini í Trongisvági. Nú vitjar oddaliðið á Giljanesi í seinasta umfarinum av grundspælinum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er uttan iva mest spennandi uppgerðin í bestu kvinnudeildini í flogbólti um vikuskiftið.

TB hevur fyri fáum vikum síðani við sigri á Mjølni bart seg heilt upp undir liðina á oddaliðnum, sum annars ikki tóktist vera at taka.

Ávegis hevur TB tó havt tað trupult í nøkrum dystum, og onga ferðina so trupult, sum tær høvdu tað á heimavølli móti Drátti. Ta ferðina var Dráttur á odda 2-0 í settum, men TB fekk tó strítt seg upp, soleiðis at stigini vórðu fingin til høldar.

So er spurningurin, hvussu tað fer at torna út, nú øvuti dysturin stendur á skránni. Dráttur hava í ár sýnt sera óstøðug avrik, men er lagið gott, so fara tær heilt víst at geva TB eina skarpan gang.

### Favorittar

Tað hevði Mjølnir helst einki havt ímóti, tí ivaleyst vildi tað inniborið, at klaksvíkskvinnurnar aftur kunnu standa einsammalar á ovastu rók, tá grundspælið er av.

Sjálvar fara tær á vitjan í Hoyvíkarhøllini, og lítið er at ivast í, at Mjølnir eru favorittar til hendan dystin. Eisini hóast tær ikki hava sýnt so framúrskarandi avrik seinastu tíðina.

Seinasti dysturin er sunnudagin, tá ÍF og SÍ skulu dystast. Enn hevur SÍ ikki fingið nakað stig til høldar, og tí er einki at ivast í, at ÍF ætlar sær stigini. Serstakliga um tær skulu gera álvara av ætlanunum at leggja seg út í stríðið um bronsukrónurnar.

Hjá monnunum er ein dystur eftir at leika, áðrenn farið verður í vetrarfrí. Hann verður mikudagin millum ÍF og SÍ.

## SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 9 | 9 - 0 - 0 | 243 | 181 | 62 | 18 |
| 2 VB | 9 | 8 - 0 - 1 | 269 | 179 | 90 | 16 |
| 3 Neistin | 10 | 7 - 0 - 3 | 297 | 215 | 82 | 14 |
| 4 Søljan | 10 | 6 - 0 - 4 | 295 | 237 | 58 | 12 |
| 5 VÍF | 10 | 5 - 0 - 5 | 242 | 224 | 18 | 10 |
| 6 StÍF | 9 | 1 - 1 - 7 | 190 | 237 | -47 | 3 |
| 7 Kyndil | 10 | 1 - 1 - 8 | 180 | 288 | -108 | 3 |
| 8 Tjaldur | 9 | 0 - 0 - 9 | 164 | 319 | -155 | 0 |

## Flogbóltur

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 9 | 8 - 1 | 25 | 7 | 18 | 16 |
| 2 TB | 9 | 8 - 1 | 24 | 8 | 16 | 16 |
| 3 Dráttur | 9 | 4 - 5 | 19 | 17 | 2 | 8 |
| 4 KÍF | 9 | 4 - 5 | 13 | 18 | -5 | 8 |
| 5 ÍF | 9 | 3 - 6 | 11 | 18 | -7 | 6 |
| 6 SÍ | 9 | 0 - 9 | 3 | 27 | -24 | 0 |